UTTAN ÚR HEIMI

## Einki neyðsamband í tunlum

Norsku myndugleikarnir hava gjørt av at brúka hálva fjórðu milliardir krónur til neyðsamband í teimum nógvu tunlunum, men nú vísir tað seg, at ætlanin umfatar als ikki allar tunlarnar.

Í Noregi eru 422 tunlar, sum eru longri enn 500 metrar, men felagið hjá sløkkiliðsmonnunum ger nú vart við, at eftir ætlanini verður einki neyðsamband í umleið 230 av teimum 422 tunlunum. Felagið vísir á, at ætlanin hjá myndugleikunum umfatar í fyrsta lagi tunlarnar við serliga nógvari ferðslu og teir, sum eru serliga langir, men tað er ikki nóg mikið.

Formaðurin í sløkkiliðsmannafelagnum, Guttorm Liebe, sigur við blaðið Nationen, at sløkkiliðini kunnu sýta fyri at fara inn í tunlar, sum ikki hava neyðsamband, skrivar tíðindastovan ANB.

## Húsaeigarar gera kvetti

Danskir sethúsa- og íbúðareigarar hava gjørt kvetti tey seinastu árini, tí tann altsamt hækkandi húsaprísurin hevur gjørt, at frívirðið í teimum flestu húsunum og íbúðunum er vaksið sera nógv.

Sambært einari útrokning hjá realkreditfelagnum Realkredit Danmark er frívirðið í donskum húsum og íbúðum hækkað 390 milliardir krónur tey seinastu fýra árini ella góðar 270 milliónir krónur um dagin. Tað ber í sær, at í dag er frívirðið í teimum donsku húsunum og íbúðunum 1.156 milliardir krónur. Fyri fýra árum síðani var tað 765 milliardir krónur, og realkreditfeløgini og bankarnir vænta, at hendan gongdin fer at standa við.

Realkreditfelagið sigur, at hækkingin stavar fyrst og fremst frá hækkandi prísum, men tann lága rentan hevur eisini gjørt, at nógv fólk hava valt at umleggja tey gomlu lánini til bílig lán.

## Borgarstjóri á odda

Tann umstríddi borgarstjórin í Meksiko býi, Andres Manuel Lopez Obrador, tykist hava bestu møguleikarnar at vinna meksikanska forsetavalið, sum verður í næstum.

Tann seinasta meiningakanningin vísir, at 32 prosent av veljarunum styðja borgarstjóran. Tað eru seks prosentstig færri enn í einari kanning í apríl, men kortini er hann framvegis tann, sum hevur størstu undirtøkuna ímillum veljararnar.

Orsøkin til afturgongdina er, at fleiri aðrir politikarar hava ávarað veljararnar ímóti at velja borgarstjóran, sum er undir illgruna fyri svik. Tey atfinningarsomu hava roynt at forða honum í at stilla upp, men higartil til fánýtis, skrivar AP úr Meksiko býi.

## Iranar fáa breiðband

Í Iran hevur stjórnin sett sær fyri at brúka meiri enn fýra milliardir krónur til eitt landsumfatandi breiðbandskervi.

Mohammad Khatami, sum fer úr forsetaembætinum um stutta tíð, sigur, at tað nýggja kervið fer at gera Iran til ein týðandi samskiftismiðdepil. Kervið, sum hevur fingið heitið "tann talgildi Silkivegurin", fer at gera Iran ført fyri at hava telesamskifti við allan heimin, sigur Khatami.-

Í fyrsta umfari skal tað nýggja kervið hava samband við Pakistan, Aserbajdjan, Armenia, Turkmenistan, Afghanistan, Kuwait og Sameindu Arabisku Emiratini.

Iransku myndugleikarnir rokna við at økja talið á telefonlinjum úr 22 í 80 milliónir innan 2010, og at í sama tíðarskeiði fer talið á iranskum internetbrúkarum at økjast úr 5,5 í 35 milliónir.

# Krevja ráðgeva hjá Bush koyrdan frá

**Ein av fremstu ráðgevunum hjá Bush, forseta er lagdur undir at hava avdúkað ein loyniligan agent hjá CIA. Demokratarnir vilja tí hava hann koyrdan frá**



*Karl Rove, sum er av norskari rætt, fær æruna av, at George W. Bush hevur vunnið tey bæði seinastu forsetavalini*

USA

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Ráðgevin Karl Rove verður vanliga umrøddur sum maðurin, ið hevur lagt bæði forsetavalini hjá George W. Bush til rættis við hepnari hond. Tí er hann ein av fremstu ráðgevum forsetans, men nú hevur hann brádliga fingið trupulleikar.

Orsøkin er, at Karl Rove er settur í samband við eitt mál, sum snýr seg um, at onkur avdúkaði fyri fjølmiðlunum, at Valerie Plame er loyniligur agentur hjá fregnartænastuni CIA. Slíkt er sera álvarssamt í USA og kann geva upp í tíggju ára fongsul. Valerie Plame er gift við diplomatinum Joseph Wilson, og hann vil vera við, at onkur, sum stendur forsetanum nær, avdúkaði loyniliga starv hennara, tí maður hennara hevði funnist at politikkinum hjá Bushstjórnini.

Verjarnir hjá Karl Rove hava viðgingið, at ráðgevin tosaði við tíðindamannin hjá Time Magazine, sum avdúkaði loyniliga starvið hjá Valerie Plame, men teir siga, at hann nevndi hana ikki við navni. Ta frágreiðingina góðtaka teir demokratisku senatorarnir ikki. Teir krevja, at forsetin skal geva Karl Rove sekkin alt fyri eitt.

Sjálvur hevur Karl Rove sagt, at upplýsingar, sum hann hevur latið frá sær, eru ikki almennar, men heldur ikki ta frágreiðingina góðtaka demokratarnir.

# Fýra limir í al-Qaeda flýddir úr fangalegu

**Fleiri hundrað amerikanskir hermenn leita eftir fýra monnum, sum eru flýddir úr einari amerikanskari fangalegu í Afghanistan**

YVIRGANGUR

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Teir fýra menninir flýddu úr fangaleguni á amerikonsku herstøðini Bagram Air Base mánamorgunin. Síðani hava fleiri hundrað amerikanskir og afghanskir hermenn leitað eftir teimum, men til fánýtis.

Amerikanska herleiðslan hevur illgruna um, at menninir fingu hjálp frá fangavørðum, so teir kundu flýggja, og at ein bilur stóð og bíðaði eftir teimum.

Tríggir av teimum flýddu eru úr Sýrialandi, og tann er fjórði er úr Libya. Sambært amerikonsku herleiðsluni hava allir tilknýti yil yvirgangsfelagsskapin al-Qaeda. Hvussu leingi teir hava verið í fangaleguni á Bagram Air Base, vil herleiðslan ikki siga, men tað er greitt, at teir blivu tiknir í Afghanistan ella í Pakistan.

Amerikanskir fjølmiðlar siga, at tað kemur herleiðsluni illa við, at fangarnir eru flýddir. Amerikanararnir hava møtt altsamt harðari og harðari mótstøðu í Afghanistan í seinastuni, og fleiri hermenn hava latið lív. Tann 28. juni bleiv ein tyrla við 16 hermonnum skotin niður. Allir doyðu, og nakrar dagar seinni doyðu tríggir hermenn í einum skotbardaga við afghanskar uppreistrarmenn, skrivar Reuterrs. Í gjár varð líkið av einum amerikonskum hermanni afturat funnið nakað norðan fyri Kabul.